Ásetingar fyri øki C2: Vinnuøki – serstøk byggisamtykt

Vinnuøki í grótbrotinum í Sandavági

Vinnuøkið grótbrotið í Sandavági verður broytt til serstaka byggisamtykt Vinnuøki C2

Fyri vinnuøki C2, avmerkt við reyðum og skákstrikum (skravera) á hjálagda korti, verða hesar serstøku samtyktir galdandi:

1. Økið verður lagt burtur av til vinnuøki og vinnubygging, t.e. heilsøluhandlar, goymslur, verkstaðir og ídnað og til tænastuvirksemi í sambandi við tey, bilstøðlar o.t.
2. Nettonýtingarstigið má ikki fara upp um 0,5.
3. Eingi hús ella einstakir partar teirra mugu vera hægri enn 9,0 m. (yvir miðaljørildi (miðal við húsahornini))
4. Loyvt verður at umvæla verandi hús, so tey eru hóskilig til nútímans nýtslu, tó má byggingarstigið ikki fara upp um 0,5.
5. Frávik kunnu verða gjørd frá ásetingunum í 3. Og 4. Þetti, í serstakari byggiætlan fyri hóskiligt, natúrligt avmarkað øki. Tó kann nettonýtingarstigið fyri økið sum heild ikki fara upp um 1,0 og hæddin ikki uppum 12,0 m. (miðal við húsahornini)
6. Nærri ásetingar um virksemi vera gjørdir í leigusáttmálunum/ognarbrøvunum fyri hvørt grundstykki.
7. Hús og bygningar annars, kunnu bert verða bygd eftir byggiætlan sum Býráðið hevur góðkent.